# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/09 - 15. september 2022 16:00-18:00

### Skrá:

1. Rundferð á Argjum og heilsa upp á nýggja deildarleiðaran á Gulaskúla
2. Kantinan á Fløtum
3. Klaga um tilboðið í hádeild (Viðfest)
4. 8. frívikan sum vetrarfrí heldur enn summarfrí?
5. Ymiskt.
   9.ð varandi ferðaloyvið
   Navnið Guliskúli

6. Áseta næsta fund: Uppskot: 17. november.

### Møtt á fundi:

Møtt: Regin, Ruth, Snorri, Erla, Sjúrður & Derhard
Forfall: Bjørg
Gestir: Jóhan Marni Stenberg

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**Rundferð á Argjum.**
Jóhan vísir runt eftir høvuðsumvæling.
Walk and talk
Skúlastýrið gleðist um góðum hølini og góðu karmarnar.
Foreldarumboðini og kommunustýrisumboðini eru skelkað av at eitt ítróttarfelag bindur 2-3 stovur harav tann eina er fungerandi barr. Kommunustýrisumboðini ætla at taka hetta upp innanhýsis í kommununi.
Eitt samst skúlastýri ynskir hetta broytt og at kommunan tekur støðu til hendan partin av virksminum hjá Argja Dart og eventuelt finnir dartfelagnum annað hóskandi høli, um barrvirksemi er týðandi partur av ítróttargreinini.

Ad.2
**Kantinan á Fløtum**
Leiðsla skúlans hevur samstarvað við INN við Grønlandsvegin um eina loysn. Nú hon skuldi setast í verk í smáum, kann INN kortini ikki tryggja eina veiting. Í høvuðsheitum orsaka av starvsfólkamangli.
Skúlastýrið heitir á leiðsluna at kanna, um til ber at finna annan veitara. Dentur skal framhaldandi leggjast á heilsugóðan, lættan mat.

Ad.3

**Klaga um skúlatilboðið í hádeild**

Skúlin hevur móttikið klagu frá LUM. Brævið er dagfest 23. august 2022 og hevur viðfest sjálva klaguna, ið er dagfest 21. juli 2022.

LUM boðar frá, at tey ikki viðgera klaguna orsaka av fyrning, men metir at skúlastýrið skal hava innlit í klaguna.

Klagarin leggur dent á, at ein næmingur hevur fingið angist orsaka av kørmunum á skúlanum og av høga fakliga trýstinum.

Skúlastýrið hevur kjakast um málið og niðurstøðan er at skúlin framhaldandi skal royna at menna og tillaga síni tilboð, so tey eru best møgulig innanfyri givnar karmar. Skúlastýrið noterar sær eisini at hetta er upplivingin hjá eini mammu og einum næmingi og tekur klagupunktini til eftirtektar og metir at hesar eygleiðingar skulu við í framhaldandi menningini av tilboðunum skúlin bjóðar hóast skýlastýrið undrast eitt sindur á orðaljóðið og nakrar á niðurstøðunm hjá klagaranum.

Ad.4

**8. frívikan sum vetrarfrí heldur enn summarfrí?**

Skúlastýrið heitir á Sjúrð um at taka hetta upp í Námsfrøðiliga ráðnum og koma aftur við eini meting haðani.

Skúlastýrið heitir á leiðsluna um at kanna hetta við fríðtíðarskúlan og fáa eina afturboðani haðani.

Skúlastýrið heitir á foreldrumboðini um at taka tað upp í umboðsráðnum og koma afturn við einum barometri millum foreldrini.

Skúlastýrið viðgerð hesar niðurstøður á næsta fundi og ger sína niðurstøðu grundað á hesar.

Ad.5

**Ymiskt**

**Ferðaloyvi til Almannarás í ferðapolitikki skúlans**

Skúlastýrið gav í summar fyribilsloyvi til 9.ð – okkara almannarás- um ferðing til Íslands. Hetta skuldi liggja saman við evnisvikuni.

Skúlastýrið heitti á Námsfrøðiliga ráðið um at taka støðu til hetta.

:

| Brot úr fundarfrásøgn |
|---|
| **Skúlastýrisumboðið hevur orðið (SRA)** |
| Umsókn frá 9. fl um at sleppa til Íslands er gingin á møti. Spurningurin er so, um hetta skal vera fastur táttur framyvir.<br><br>**BSA**: Gott er at fara at ferðast heldur enn at hava evnisviku. Hetta er eisini gott trivnaðarátak og ein faklig avveksling. Túrurin er bíligur við Norrønu, har tey fáa ferð, mat og uppihald í einum. Túrurin kostar 2.200 kr. Næmingarnir rinda sjálvir. Sum skilst er hetta væl bíligari enn ferðin hjá 9.í.<br><br>**MAE**: Foreldur spyrja ofta eftir einum slíkum møguleika.<br><br>**JSP**: Hvat við teimum, sum ikki hava ráð?<br><br>**AMS**: Samd við JSP, at hetta kann vera ein fíggjarlig byrða hjá einum húski.<br><br>**KDA**: Fínt. Skulu bara vita tað í góðari tíð. Ikki gera mismun millum ð og í. |

**FDI**: Hava roynt tað fyrr og hava góðar royndir at savna pengar inn sum flokkur.

**JSP**: Hetta er ein fólkaskúli fyri øll. Børn ferðast eisini í øðrum samanhangi, t.d. ítrótti. Minnast til tey, sum sita stramt í tí fíggjarliga.

**EMJ**: Vit fara um ikki langa tíð at hava fastar flokkar frá 7-9. Hetta sama toymið kann fyrireika ein slíkan túr í góðari tíð.

**AAF**: Tað kann vera, at hetta er einasta ferð børnini sleppa at fara.

**BSA**: Tey, sum ikki eru við í ítrótti, sleppa nú endiliga ein túr.

**RMA**: Vit atkvøða, um tað skal bera til hjá 9. flokki at fara uttanlands – t.e. ein bíligan Íslandstúr um heystið.

**TCJ**: Hvat sigur leiðslan?

**RMA**: Ein slíkur bíligur túrur er til at góðtaka. Tað ber ikki til at fara ein dýrari túr.

**SAG**: Hvat við at 9.í eisini fer ein eins bíligan túr?

**RMA**: Tey *skulu* ferðast við flokkinum sum part av ítróttartilboðnum.
Atkvøtt varð um málið, og 57 eru fyri, og 1 ímóti. Hervið samtykt

**Guliskúli (4-10 tilboðið)**
Deildarleiðarin arbeiðir við einum navnaskifti. Hetta skal gerast formliga gjøgnum kommununa.
Skúlastýrið skal viðmæla ella frámæla umsóknina áðrenn hon er send.
Eitt samt skúlastýri tekur undir við umsóknini og viðmælir navnaskiftið.

**Áseta næsta fund**
17. november 2022 16:00 á Fløtum

Vegna skúlastýrið

Regin Marnersson 15/9-2022